

*Anfinn Kallsberg og formaðurin fyri stjórnarflokkin Konservativa Fólkaflokkin Bendt Bendtsen*

# Tað ræður um at kenna tey røttu

**Fólkatingsarbeiði snýr seg um at hava tilknýti til fólk, ið hava ávirkan, sigur nývaldi fólkatingslimurin. Hóast at Anfinn hevur valt at standa uttanfyri Norðuratlantsbólkin, kennir hann seg ikki einsamallan**

CHRISTIANSBORG
*Marjun Dalsgaard*
*Mynd: Jerry Bergman*

Arbeiðið á Chrisitansborg gongur ikki fyri seg í fólkatingssalinum, men alla aðrastaðni. Í krókunum, langt vekk frá fjølmiðlum og politiskum mótstøðufólki, ella saman við teimum, verða nógvar lagnur avgjørdar, alliansur smíðjaðar, og ætlanir lagdar. Skalt tú koma nakran veg, skal tú kenna fólk — helst tey, ið eru har, sum avgerðirnar verða tiknar og tey, ið hava nakað at siga, tá avgerðir verða tiknar.

- Hevur tú ikki samband við tey, sum hava ávirkan og vita hvat gongur fyri seg, er hetta ein rein oyðimarkargongd, sigur Anfinn Kallsberg um at vera á Christiansborg og leggur aftrat:

– Eg kenni nógv fólk her – fólk, sum hava nakað at siga, har avgerðirnar verða tiknar. Við mínum tilknýti til tey, ið hava ávirkan her, kann eg arbeiða fyri føroyskum áhugamálum við at vita akkurát hvat fer fram og við at samstarva við tey, ið hava ávirkan, sigur hann. At hava ein góðan dialog við danir, er somueliðis ein týdningarmikil liður í hesum.

– Eg fari ikki at tosa um rein føroysk viðurskifti í fólkatingssalinum, og eg fari ikki at leggja meg út í rein donsk viðurskifti, eg ynski ikki at skapa øsing millum danir og føroyingar.

Anfinn Kallsberg hevur sum kunnugt valt at standa uttan fyri Norðuratlantsbólkin. Samstarvið við Einheitslistan hjá Norðuratlantsbólkinum dregur hann ikki — ikki minst tí teir liggja ov langt til vinstru eftir hansara tykki. Kanningararbeiði er heldur ikki tað, hann hevur hug til at gera.

– Kanningar kunnu gerast aðrastaðni — tað er ikki fólkatingsarbeiði, sigur Anfinn Kallsberg.

### Týdningarmikið at luttaka

Tað kann verða eitt sindur ilt at greiða frá týdningum av at hava føroyingar á dan-atingi, um teir ikki skulu leggja seg út í donsk viðurskifti og ikki tosa um føroysk viðurskifti í fólkatinginum, men tað er júst hetta, at vera allastaðni har avgerðir verða tiknar, sum á nakran hátt ávirka Føroyar, sigur Anfinn Kallsberg. Hann er ikki í nøkrum tingbólki, men hevur samstarv við Konservativa Fólkaflokkin millum annað viðvíkjandi øllum tekniskum viðurskiftum, men eisini politiskt.

– Eg havi gjørt eina avtalu við Konservativa Fólkaflokkin, um at eg við einum skotsbrái uppá tríggjar dagar kann fara í eina nevnd. Á tann hátt kann eg arbeiða í teimum nevndum, sum eru av týdningi fyri føroysk áhugamál uttan at leggja meg uppí donsk viðurskifti, sigur hann, og leggur aftrat, at hann ikki er avskorðin frá at broyta meining, um hann kortini ynskir at gerast fastur limur í eini nevnd.

Høgni Hoydal sigur, at hann eins og Anfinn Kallsberg hevur eina standandi avtalu um at møta í nevnd í fall, at hon viðger eitthvørt evni, sum viðvíkur Føroyum. Harumframt hevur Norðuratlantsbólkurin fastar sessir í trimum nevndum. Kuupik Kleist úr grønlendska vinstrahalla loysingarflokkinum, Inuit Ataqatiqiit, er limur í Umhvørvisnevndini, Lars-Emil Johansen úr grønlendska Javnaðarflokkinum, Siumut, er limur í Uttanríkisnevndini, og Høgni Hoydal er limur í Politiskubúskaparligu nevndini, har føroysk viðurskifti vanliga verða viðgjørd.

# Ein sigur hjá Amnesty

**Hægstirættur í USA steðgar nú deyðarevsing móti ungdómum**

DEYÐAREVSING
*Tíðindaskriv frá Amnesty International*

Við einum teprum meiriluta, 5 atkvøður móti 4, avgjørdi Hægstirættur í USA týsdagin 1. mars at seta forboð móti deyðarevsing fyri ungdómsbrotsmenn. Hetta er ein stórur sigur í stríðnum móti deyðarevsing

Hesar avrættingarnar eru brot á altjóða rætt. Harafturat er breið semja um millum flestu av heimsins londum, at deyðarevsing fyri brotsgerðir framdar av børnum stríðir ímóti trúnni á møguleikarnar hjá ungdómum at mennast og broytast. Lívið hjá einum barni má ikki fara til spillis, uttan mun til hvat hann ella hon hevur gjørt. Alt má vera gjørt fyri at fáa tey aftur á beint og slúsaði inn í samfelagið aftur. Deyðarevsingin er størsta andsøgnin móti hesi fatan.

Hóast flestu lond, sum enn hava deyðarevsing, ikki longur avrætta børn, sum fremja brotsverk, eru børn enn ikki heilt vard móti hesari avoldaðu praksis. Síðani 1990 hevur Amnesty International skjalprógva í 39 avrættingar av børnum, av hesum vóru 19 í USA. Síðani 2000 hava 19 avrættingar verið, USA átti 9 av hesum. USA er einasta landið í heiminum sum alment hevur viðgingið, at tað hevur avrættað ungdómsbrotsmenn.

Í løtuni sita gott 70 ungdómar fongslaðir í USA, sum eru dømdir til deyðis fyri brotsverk framd áðrenn tey fyltu 18 ár. Avgerðin hjá Hægstarætti merkir, at avrættingarnar ikki vera framdar, í staðin verða dómarnir broyttir til fongsulsrevsingar.

Amnesty arbeiðir við einum 2 ára átaki við tí endamáli at fáa avtikið deyðarevsing móti ungdómsbrotsmonnum um allan heim í seinasta lagi við ársenda 2006. Vónin er, at tey fáu lond, sum enn avrætta ungdómsbrotsmenn, fylgja avgerðini hjá USA og at málið hjá Amnesty á henda hátt verður rokkið sum skjótast.

Vit eru altíð fús at svara spurningum ella greiða nærri frá onkrum máli. Ring ella skriva til skrivstovuna. Ring heim til ein av nevndarlimunum ella legg eini boð á telefonsvararan, so seta vit okkum í samband við tykkum.

## Móttøka á Fonn Flog

Í sambandi við at Fonn Flog hevur keypt ferðaskrivstovuna Novena Tours í Saltangará, verður almenn móttøka í hølunum á Heiðavegi leygardagin 5. mars frá 12:00-15:00.

Høvi verður hjá teimum vitjandi at vinna eitt gávubræv frá Atlantic Airways og Fonn Flog við vikuskiftisferð fyri tvey til Keypmannahavnar.

Fonn Flog keypti Novena Tours fyrst í februar mánað í ár, og síðani hevur ferðaskrivstovan verið stongd vegna umvælingar. Í sambandi við móttøkuna komandi leygardag fáa tey vitjandi høvi at síggja nýumvældu deildina og hitta starvsfólkini.

Hesi 12 árini Fonn Flog hevur virkað sum ferðaskrivstova, er kundaskarin kring alt landi støðugt vaksin. Tá møguleikin beyðst herfyri at keypa Novena Tours í Saltangará, sóðu tey á Fonn Flog hetta tískil sum eitt sera gott høvi at koma nærri kundunum á Eysturoynni og á meginøkinum.

Nýggja deildin hjá Fonn Flog í Saltangará letur upp mánadagin 7. mars.

**-ave-**

## Kortgjaldið verður strikað

Báðir teir stóru peningastovnarnir boðaðu týsdagin frá, at teir nú strika umstrídda kortavgjaldið

Ístaðin fyri kortgjaldið kemur eitt haldaragjald, sum handlarnir skulu rinda. Sparikassin sigur í tíðindaskrivi, at hetta verður soleiðis, handlar við færri enn 5.000 flytingum gjalda 500 krónur árliga. Handlar við millum 5.000 og 20.000 FR-kort-flytingum gjalda 2.700 krónur fyri tænastuna, meðan haldið fyri handlar við meira enn 20.000 árligum flytingum er 10.000 krónur.

Føroya Banki hevur enn ikki ásett sítt gjald, men har verður sagt, at gjaldið helst verður í samsvari við tað, sum semjan í danska bankaheiminum tykist blíva. Og tað eru somu gjøld, sum Sparikassin hevur ásett.

**-jm**